## Kór á ferð

„Kórið hjá Jóhan“, sum Jóhan Mortensen stjórnar, og sum er mannað við sangarum av leiðini við Skálafjørðin, fer seinni í mánaðinum til Danmarkar og Týsklands at hava konsertir. Á veg til Berlin steðgar kórið í Esbjerg, har tað fer at hava konsert í Zions-kirkjuni leygardagin 31. mars kl. 18. Á veg heimaftur steðgar kórið í Sevel nærhendis Skive, har tað fer at hava konsert saman við einum donskum vinarkóri í Ejsing-kirkju.

## Spara við samanlegging

Í Grønlandi hava politikararnir gjørt av at leggja kommunur saman, so landið fær fýra stórar kommunalar eindir ístaðin fyri tær 18 kommunurnar, sum nú eru. Í seinastuni hava fleiri sagt seg ivast í, at samanleggingin fer at hava nakra fíggjarliga sparing við sær, men Lars Emil Johansen, landstingsmaður og framsøgumaður, mælir fólki til at geva tol. Sambært ætlanini verður sparingin 220 mió. krónur, men slík broyting tekur tíð, sigur hann.

## Friðarligt í Havn

LØGREGLAN
*Leo Poulsen*

Løgreglan í Havn hevur ikki havt nógv at gera um vikuskiftið. Vakthavandi sigur, at fríggjanáttina vórðu tveir bilførarar tiknir fyri at koyra við kenning, og leygarnáttina vórðu tveir tiknir fyri at koyra ov skjótt. Hesir verða frádømdir koyrikortið treytað, og tað merkir, at endurtaka teir lógarbrot innan trý ár, missa teir koyrikortið.

Okkurt herverk er eisini framt. Fríggjanáttina vóru nakrir rútar í Evangeliuhúsinum brotnir, og leygarnáttina stóð løgtingshúsið fyri skotum. Eisini har varð ein rútur brotin.

Men burtursæð frá hesum vóru tað bert tríggir persónar, ið løgreglan tók við á støðina fyri brot á politiviðtøkurnar, ið órógvaðu. M.a. hevði tann eini persónurin spýtt á løgreglubilin og í aðrar mátar uppført seg "býtt", sum vakthavandi tekur til.

Hóast hetta nevnda lýsir løgreglan vikuskiftið sum friðarligt, serliga tá hugsað verður um, at P-dagur var fríggjadagin, og tað vanliga merkir fleiri fólk í býnum enn vanligt.

**EINKI NÝTT…**

Heldur ikki uttan fyri høvuðsstaðin fekk løgreglan sveittan fram um vikuskiftið. Í Norðoyggjum varð ein bilførari tikin fyri at koyra við kenning, men tað var eisini einasta pappírsarbeiði, politiið mátti gera.

Og í suðri hevði løgreglan als einki at gera.

Einasta fráboðan var um eitt rørí einum rulluportri í Hvalba, sum var brotnað. Tað kundi verið til vanda fyri ferðsluna, men Landsverk umvældi skaðan beinanvegin, sigur Sommer Joensen, sýslumaður.

Og til dansin í TB-høllini møttu bert 8 dansihugað ungfólk, so har bleiv eingin gamal.

Heldur ikki um restina av landinum var nakað at frætta um ófrið frá løgreglustøðunum.

Sambært keldum í Fólkaflokkinum:

# Anfinn og Óli stilla uppaftur

**Áhaldandi leysasøgur vilja vera við, at Anfinn Kallsberg ikki hevur ætlað sær at stilla uppaftur til løgtingsvalið, men sambært vælvitandi keldum innan flokkin, er fyrrverandi løgmaðurin kortini til reiðar at taka enn eitt tørn á tingi**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*





Tað kundi verið frítíðarítrivið, seyður, fuglur, náttúran, sum dróg.

Men tann megin er tó ikki so sterk, sum trúfestið móti Fólkaflokkinum – um ein skal trúgva vælvitandi keldum, ið standa flokkinum sera nær. Anfinn Kallsberg stillar upp til næsta val eisini.

Hann hevur annars roynt tað mesta í politikki. Formaður í Fíggjarnevndini, fíggjarmálaráðharri og ikki minst løgmaður. So tað eru fáir av teimum "tungu" politisku postunum eftir at royna. Og haraftrat er hann annar av sitandi føroysku fólkatingslimunum.

Alt hetta hevur fingið søgurnar at ganga um, at Anfinn ikki fór at stilla upp aftur til komandi løgtingsval. Og tað kundi eisini verið væl hugsandi, ikki minst við tí í huga, at hann gjøgnum drúgvu politisku lívsleið sína hevur tryggjað eitt fíggjarliga nøktandi otium.

Líka síðani Anfinn Kallsberg kom á ting í 1980, hevur hann til hvørt val "umhugsað" ikki at stilla uppaftur. Men hvørja ferð hevur hann tó broytt meining, og tí eri eg sannførdur um, at hann eisini til næsta val fer at verða á listanum hjá flokkinum í Norðoyggjum, sigur ein av keldunum, Sosialinum hevur tosað við.Og eisini høvuðspersónurin sjálvur gevur ábendingar um, at so verður.

Tað er eingin loyna, at eg havi fingið og framvegis fái ótrúliga stóra uppbakking frá flokkinum, og tað ger tað ógvuliga torført at taka seg úr politikki, sigur Anfinn Kallsberg uttan tó heilt definitivt at siga, hvørt hann stillar upp ella ikki. Tað er tó alt ið bendir á, at so verður. Og samstundis kveistrar ein annar Fólkafloksmaður allan iva um sína framhaldandi karrieru í politiska lívinum til viks. Og tað er Óli Breckmann.

Ivi hevur verið sáddur um framtíðina hjá fyrrverandi stavnamanninum, men sjálvur sigur Óli:

- Tað kundi kanska verið stundin til at latið yngri kreftir komi til, men sum støðan er í løtuni ætli eg mær at stilla upp til eitt skeið aftrat.

Sostatt tykist allur ivi um politisku framtíðina hjá tveimum av tungvektarunum í Fólkaflokkinum manaður í jørðina.

# Tjóðveldisflokkurin vil avtaka skattalættan

**- Tað fer at spara landi og kommunum 85 milliónir krónur, tekur nakað av ferðini av búskapinum, minkar eitt sindur um sosialu gjónna og bøtir um grundarlagið fyri haldgóðum vælferðartænastum. Hetta sigur Tjóðveldisflokkurin m. a. í viðmerkingum til uppskotið um at taka av ætlaða skattalættan hjá Landsstýrinum**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Tað er neyvan komið fyri oftani, at ein andstøðuflokkur, tá bert 10 mánaðir eru eftir til val, leggur fram uppskot um at strika skattalættar. Tað sigur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins.

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt uppskotið fram um at strika skattalættan, sum samgongan hevur samtykt fyri 2008. Ein skattalætti, ið sambært landsstýrinum sjálvum í minsta lagi fer at kosta landskassanum 72 mió. kr og kommunum 13 mió. í 2008.

Fyri hetta valskeiðið koma skattalættar landsstýrisins annars at kosta landi og kommunum í minsta lagi 380 mió. kr., sambært tølunum hjá landsstýrinum.

Høgni Hoydal sigur, at ikki bara andstøðuflokkar, men eisini Búskaparráðið, fakfeløg og allir búskaparfrøðingar, ið hava gjørt vart við seg, ávara staðiliga ímóti skattalættnum hjá landsstýrinum.

Í uppskotinum hevur Tjóðveldisflokkurin m.a. hesar grundgevingar:

Tjóðveldisflokkurin heldur, at skattapolitikkurin hjá landsstýrinum rætt og slætt er ábyrgdarleysur:

- Hann er sosialt órættvísur og veksur um stættarmunin.
- Hann útholar samhaldsføstu hugsjónina um, at tann, ið hevur ráð, letur lutfalsiga meira til felagsskapin.
- Hann elvir til yvirhiting av búskapinum, hækkað kostnaðarstøði, inflasjón, versnandi handils- og gjaldsjavna og versnandi kappingarføri.
- Hann undirgrevur eina trygga og samhaldsfasta fígging av vælferðartænastum hjá landi og kommunum, tí landskassin dúvar í størri mun upp á mvg- og avgjaldsinntøkur av privatum forbrúki – og tá forbrúkið stendur í stað ella minkar, er eingin fígging til vælferðartænastur.
- Hann hevur elvt til, at vit ikki hava gjørt okkum leys av donsku heildarveitingini, ið nú hevði verið ein viðfáningur, um politikkur til frama fyri ein sjálvberandi búskap hevði verið førdur, heldur enn skattapolitisk eksperiment til frama fyri tey fáu.

Tí verður skotið upp at strika tann skattalættan, ið er samtyktur at koma í gildi 1. januar 2008.

Hetta kann bøta eitt sindur av skaðanum, ið longu er hendur – og hetta fer í minsta lagi:
- at spara landskassanum 72 mió. kr. og kommunum 13 mió. kr. árliga,
- at taka eitt sindur av ferðini av einum búskapi, ið er á veg móti heilt álvarsligum trupulleikum,
- at minka eitt sindur um sosialu gjónna,
- at bøta um grundarlagið fyri haldgóðum vælferðartænastum.